**Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð.**
**Bygdarráðsfundur tann 30. mars 2016, kl. $19^{00}$.**

**Bygdarráðslimir á fundi:** Pauli T. Petersen, Karl A. Olsen, Malan Stórá, Herit Magnussen, John Zachariassen og Jógavn Emil Nielsen
**Skrivari:** Maud Poulsen

---

Vísandi til grein 18, stk. 2, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri boðaði Durita á Heygum tann 1. apríl 2016 frá, at henni barst frá at møta á fundinum, tí hon er stødd uttanlands í arbeiðsørindum. Tann 27. apríl boðaði Hilbert Elisson frá, at honum barst frá at møta á fundinum orsakað av arbeiði.
Tiltakslimurin Øssur Christiansen fekk fundarboð tann 27. apríl. Hann játtaði at møta, men seinni sama dag frá, at honum barst frá at møta. Síðani fekk Jógvan Emil Nielsen fundarboð, og játtaði at møta. Andrea Nielsen fekk somuleiðis fundarboð, men hon fekk ikki møtt.

Sambært grein 18, stk. 3, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, skal kommunustýrið gera av, um treytirnar fyri innkalling av tiltakslimi eru loknar.
Bygdarráðið samtykti einmælt at góðkenna innkallingina av Jógvan Emil Nielsen sum tiltakslimur.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 169**
Tilmæli frá Trivnaðar- og umhvørvisnevndini um at leggja foreldraráðini fyri ávikavist Gjáarlon og Látipípuna saman í eitt foreldraráð fyri alt dagstovnaøkið í Vestmanna Kommunu.
J.nr. 16.05.10-P24-1-16

Trivnaðar- og umhvørvisnevndin viðgjørdi á fundi tann 13. apríl 2016 málið um at leggja foreldraráðini fyri ávikavist Gjáarlon og Látipípuna saman í eitt foreldraráð fyri alt dagstovnaøkið í Vestmanna Kommunu. Ætlanin er ein fylgja av, at dagstovnaøkið í Vestmanna Kommunu nú hevur felags leiðslu, og at ynskiligt tí er at viðurskiftini á økinum í mest møguligan mun er felags.

Nevndin mælir bygdarráðnum til at taka undir við at seta úr gildi viðtøkurnar fyri foreldraráðið í Látipípuni og viðtøkurnar fyri foreldraráðið í Gjáarlon, og samstundis at samtykkja viðtøkurnar fyri foreldraráðið fyri dagstovnaøkið í Vestmanna Kommunu.

**Viðv. 169**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 20.30

Sign.:

| | | |
|---|---|---|
| Pauli T. Petersen | Karl A. Olsen | Jógvan Emil Nielsen |
| Herit Magnussen | Malan Stórá | John Zachariassen |